## Keypiorkan minkar nógv

Ein útrokning hjá Íslandsbankanum vísir, at keypiorkan hjá íslendingum fer at minka umleið 20 prosent tey bæði næstu árini. Tað merkir, at keypiorkan í 2011 verður tann sama sum í 2003. Tølini hjá bankanum vísa eisini, at keypiorkan hjá tí íslendska brúkaranum vaks meiri enn 80 prosent í árunum frá 1994 til 2007, og at talan var um vøkstur á hvørjum ári uttan í 2001. Íslandsbankin sigir, at sjálvt um keypiorkan fer at minka nógv hetta til 2011, verður keypiorkan tá kortini 42 prosent størri enn í 1994 og smá níggju prosent størri enn í 2001.



## Motorskaða undir lending

Tá eitt Boeing 737 flogfar hjá danska felagnum Cimber Sterling skuldi seta seg á flogvøllin í Firenze í Italia í summar, steðgaði annar motorurin, uttan at nakað ávaringarljósboðaði frá breki. Óhappið hendi tann 13. juni, og frágreiðingin frá skaðanevndini kom í gjár, skrivar DR. Sambært skaðanevndini steðgaði annar motorurin, tí ein luftventilur inni í motorinum setti seg fastan. Flogfarið var tá í 800 metra hædd, og flogskipararnir valdu at steðga lendingini. Løtu seinni fór motorurin í gongd, og flogfarið setti seg í øllum góðum. 130 ferðafólk vóru umborð.

# Føroyskt greinasavn um mannarættindi




*Ein røð av føroyskum serfrøðingum hava skrivað greinarnar í nýggju útgávuni »Greinasavn um Sameindu Tjóðir og Mannarættindi«*

**Fyri fyrstu ferð er komið út greinasavn á føroyskum, ið lýsir Sameindu Tjóðir við serligum atliti til spurningar um mannarættindi**

GREINASAVN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hvørjir altjóða sáttmálar eru galdandi í Føroyum, og hvønn týdning hava teir fyri føroyingar? Hvat stendur í slíkum sáttmálum, og hvussu kunnu teir brúkast?

Hetta er nakað av tí sum svar fæst á í bókini *Greinasavn um Sameindu Tjóðir og Mannarættindi*, sum júst er komin út.

### Til føroyskar lesarar

Bókin er tann fyrsta av sínum slagi á føroyskum, og kann hon tí verða eitt týdningarmikið íkast til føroyska kjakið um mannarættindi framyvir. Greinarnar viðgera mannarættindi úr mentanarligum, sosialum, búskaparligum, politiskum og løgfrøðiligum sjónarhornum og eru skrivaðar av føroyskum serfrøðingum, ið hava fakligar og praktiskar royndir í altjóða mannarættindaspurningum. Heldur enn at týða útlendska bókaútgávu, hevur Amnesty International Føroya deild valt at skapa eitt sjálvstøðugt verk, ið hóskar til føroyskar lesarar og føroysk samfelagsviðurskifti anno 2009.

Átta partar eru í bókini, og teir taka lesaran á ferð ígjøgnum ST-stovnin og útvaldar mannarættindasáttmálar.

Bókin er serliga ætlað teimum, ið eru á hægsta stigi í miðnámsskúlum og á byrjanarstigi á hægri lærustovnum. Eisini er bókin væl hóskandi sum støðislesnaður hjá miðlafólki og starvsfólki í umsitingini, ið starvast við mannarættindum.

Greinasavnið er harumframt kærkomið hjá øllum, ið vilja ogna sær størri og neyvari innlit um altjóða mannarættindaviðurskifti.

Bókin *Greinasavn um Sameindu Tjóðir og Mannarættindi*, sum Amnesty International Føroya deild hevur ritstjórnað, er útkomin á forlagnum Fróðskapi og fæst í bókabúðum kring landið.

# Vinnarar av teknikapping funnir

**Eini 500 børn luttóku í teknikappingini á Savnsfagnaðinum herfyri, og nú hevur Listasavn Føroya funnið vinnararnar. Frá Listasavninum frætta vit, at sera nógvar góðar og spennandi myndir vóru at velja ímillum, og hava tey valt fýra myndir út, eina fyri hvønn av teimum fýra aldursbólkunum**

*Tíðindaskriv*

Vinnararnir fáa ein góðan vinning sendandi frá Listasavni Føroya, sum eisini takkar fyri góðu luttøkuna



Í aldursbólkinum 3 - 5 ár vann **4 ára gamli Helgi í Nesinum úr Havn**. Hann hevur teknað eina mynd av einum violbláum figuri á hvítari bakgrund, ið fyllir allan myndaflatan. Figururin fevnir alt umhvørvið við víðopnum ørmum.



Í aldursbólkinum 5 - 8 ár vann **5 ára gamli William Joensen úr Havn**. Hann hevur teknað ein vælnøgdan Dunnald Dunnu figur í síni heilt egnu tulking. Figururin er teknaður mitt fyri í myndini á hvítari bakgrund. Hann er teknaður við svørtum liti og littur gult, reytt, blátt og appilsingult.



Í aldursbólkinum 8 - 12 ár vann **10 ára gamla Malan Debes Joensen úr Hoyvík**. Hon hevur teknað eina kanin ella ein asna svartan við hvítum flekkum og ljósareyðum oyrum mitt í myndini. Uttanum er ein grasflati við trimum blómum og ein bláur himmal við tveimum skýggjum og einari sól. Myndin er løtt, glað og fagurlitt.



Í aldursbólkinum 12 - 16 ár vann **15 ára gamla Marjun Reginsdóttur úr Havn**. Hon hevur teknað ein úlv við svørtum skugga, og aftanfyri lýsir eitt bjart ljós út úr eini opnari hurð vinstrumegin. Høgrumegin figurin er ein grálígur/violbláur skuggi við nakað av krutli. Myndin er væl teknað og vísir á ein væl mentan myndsans.

KOYRIKORT

Nýtt teori skeið til persónbil, byrjar mánadagin 9. november. Undirvíst verður í Tórshavn, eins og koyringin verður í Tórshavn.

Prísur: 9.000 kr. fyri lógkravdu tímarnar
Tilmelding á telefon 212101

KOYRISKÚLIN
v/Róland Joensen